# Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo

# SKAMMA TEG AKSEL...!

Ein landsstýrismaður, sum sigur nakað so óheppið, sum Aksel V. Johannesen gjørdi í Eygsjón í útvarpinum fríggjdagin, eigur at trína alment fram og biða um eina umbering.

Men tað hevur Aksel V. Johannesen ikki gjørt. So tað er annaðhvørt tí, at hann meinti tað, hann segði – ella tí at hann ikki vil taka í egnan barm.

Tað var rørandi at síggja innslagið í Degi og Viku í gjárkvøldið, tá sjónvarpið var heima og vitjaði Eydnu Skaale og spastiska son hennara, sum ikki er sloppin til ergoterapi, tí at eitt stríð millum fakfelagið og Heilsumálaráðið og Heilsutrygd er gingið hart út yvir sakleysu børnini.

Tað var júst hetta, sum var evnið í Eygsjón fríggjadagin, tá Aksel V. Johannesen segði soleiðis: »Viss tað eru børn, sum hava lættari motoriskar trupulleikar, so kann samfelagið ikki rinda 475 krónur um tíman fyri at tey ganga til baking ella aðrar venjingar. Tað er nú einaferð soleiðis, at foreldrini, mamman og pápin, mugu hava ábyrgdina av at baka saman við barninum...«

Her fór landsstýrismaðurin yvir mark – ella hevur hann eftir øllum at døma ikki nóg gott innlit í málið. Innslagið við Eydnu Skaale og soninum Benjamin vísti, hvussu stóran týdning júst tað at baka við barninum kann hava, og er tað ein partur av ergoterapiini, so hví ikki tað? Tað er ikki rætt av landsstýrismanninum at niðurgera eina viðgerð á ein slíkan hátt.

Tí fyri fólk við vanligum førleikum er slíkt eingin trupulleiki, og tí er tað ov bíligt at kalla tað fyri tíðar- og pengaspillu. Stóra avbjóðingin hjá hesum børnum er at fáa røttu vøddarnar at gera tað, sum hvødið vil, og tí fellur tað sum vera man lættari, tá tey sleppa at gera okkurt, sum gevur meining.

Tað er altíð sera óheppið, tá ein veikur bólkur liggur í klemmu í einum stríði, sum í hesum føri millum eitt fakfelag og almennar myndugleikar. Tað møguligt, at landsstýrismaðurin og Almannastovan ynskja



broytingar, og at viðgerðin skal skipast hjá tí almenna og ikki av privatum ergoterapeutum. Men tað kann so ongantíð vera rætt at taka veiku børnini sum gíslar, so sum úrslitið hevur verið í hesum stríðnum seinastu mánaðirnar.

Tað er sjálvandi at fegnast um, at tað umsíðir í gjár kom semja millum partarnar, soleiðis at viðgerðirnar kunnu takast uppaftur. Men fyri tað hevði tað verið hóskandi, at landsstýrismaðurin vísti seg eyðmjúkan og tók aftur óhepnu orðini um bakingina. Tí tey, sum brúka slíkan málburð hava týðuliga ikki hóming av, hvat tað merkir at hava skerdar førleikar, og tað sømir seg ikki einum landsstýrismanni í heislumálum.

**Skilir ikki hvat tað merkir at hava skerdar førleikar**

# Størri Vikuskifti – og nýtt innihald

**Eyðun Klakstein**

Føroya besta vikuskiftisblað verður nú enn størri og betri. Vikuskifti í Sosialinum veksur fríggjadagin upp í 32 síður.

– Okkara lesarar hava verið sera glaðir fyri Vikuskifti, sum er í blaðnum fríggjadagar, og nú hava vit valt at gera Vikuskifti enn størri og enn betri, sigur Eirikur Lindenskov, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

- Fólki dámar væl at lesa bløð um vikuskiftini, og tí vilja vit geva okkara lesarum eitt enn betri vikuskiftisblað, sigur hann.

Tað er hálvt annað ár síðani, at Sosialurin fór undir nýggja Vikuskifti, og blaðið, sum hevur verið 24 síður til støddar seinastu tíðina, veksur nú við átta síðum. Blaðið bjóðar samrøður, undirhald, góð ráð, kappingar, bakgrund og mangt annað. Sosialurin fer nú eisini at bjóða eitt serligt vikuskiftishald til sínar lesarar. Tað vil siga, at fólk kunnu tekna seg sum haldara av vikuskiftis-Sosialunum og fáa blaðið borið til dyrnar hvønn fríggjadag.



Sosialurin

Fríggjadagur 4. februar 2011 Nr. 15 85. árg. kr. 25,00

BYGMA www.balslev.fo BALSLEV sí lýsing á síðu 3

VIKUSKIFTI

Barbara líkist frá hinum vs16-17

RAKUL FEKK SÍN JOHAN

– Tá eg møtti Johan, tók hann heilivági fyri angist, depressión og aðrar sjúkur, drakk illa og var provokerandi. Eg skilji ikki ordiliga, hvat tað var, sum hendi, sigur Rakul Dalsgaard, sum giftist við Johan í Kollafirði farna vikuskifti vs8-9-10

Annika í hernað móti smuglarum s4

Kjak um stripp: Kunnu ikki løggeva móti greði vs12-13

www.krosstein.fo Orkusparandi KETIL Arimax 17 SK SVENDKROSSTEIN Falkavegur 6 · 100 Tórshavn · Tel. 34 46 00 · Fax 34 46 01

NORA skapar samstarv Stuðul til samstarvsverkætlanir í Norðuratlantshavi | Umsóknarfreist: 1. mars 2011 NORA Nordic Atlantic Cooperation | Les meiri á: www.nora.fo

Elektromekaniskur verkstaður El motorar Kaeser kompressorar Flygt pumpur Ítgerar Øll køli og frystiútgerð



## Óli ivast í løgtinginum

TÍÐINDI Á SÍÐU 43



## D-A-D á Summar Festival

TÍÐINDI Á SÍÐU 42

# Einki eftirlit við sólmiðstøðum




Tað er onki eftirlit við sólstøðunum í Føroyum og sostatt er heldur onki eftirlit við, um sólrørini eru ov sterk ella um trygdin annars er ílagi.

Tað sigur Aksel V. Johannesen eftir at Bjørt Samuelsen, løgtingskvinna, hevur spurt hann um hetta.

Hann leggur afturat, at útfrá einum heilsupolitisku sjónarmiði er tað sera óheppið, tí tað er greiður samanhangur ímillum ovurnýtslu av sólstøðum og krabbameini í húðini og móðurmerkjakrabba.

Tað er arbeiðseftirlitið, sum hevur hesa uppgávuna, men haðani hevur landsstýrismaðurin fingið at vita, at hetta er ein uppgáva, sum tey ikki hava fíggjarliga orku at røkja.

Hann hevur áður boðað frá, at hann ætlar at leggja uppskot fyri Løgtingið um at forbjóða ungum undir 18 ár at fara í solarium.

Hesa ætlanina stendur hann við og uppskot um hetta verður lagt fyri Løgtingið í seinasta lagi á ólavsøku, sigur hann.

Enn hevur onki Norðurland bannað ungum undir 18 ár at keypa sær tíð í solarium tó at nógv kjak er um hetta í okkara grannalondum og í ES sum heild

Hinvegin hevur hann fingið at vita frá danska krabbameinsfelagnum, at í Fraklandi, Skotlandi, Spania og í Avstralia er tað bannað at hava ómannaðar sólstøðir.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo